ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagf.: 29. juni 2023
Mál: 23/13099-3
Viðgjørt: Heri Petersen

Nr. 52-128/2022

Fyrispurningur eftir tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um sjúkradagpengar til tímalønt, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Sirið Stenberg (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er gongd sett á arbeiðið at endurskoða sjúkradagpeningaskipanina til tímalønt?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er nøktandi, at eitt arbeiðsfólk fær útgoldið í mesta lagi 80% av eini arbeiðsmannaløn um mánaðin at liva fyri, tá sjúka rakar?

Svar:
Spyrjarin vísir í viðmerkingunum til spurningin á, at sjúkradagpeningalógin ikki tekur hædd fyri, at nøkur tímalønt hava óstøðugt arbeiði, og tað sostatt kann tað vera ein fíggjarligur smeitur, tá ein persónur, sum t.d. arbeiðir á flakavirki, verður sjúkur. Landsstýrismaðurin skal vísa á, at endamálið við § 8, stk. 3 í sjúkradagpeningalógini er at fyribyrgja, at uttanífrá komandi orsøkir hava við sær, at seinastu 5 vikurnar ikki geva eina rætta mynd av inntøkumissinum. § 8, stk. 3 ásetir, at í eini arbeiðssetan við skiftandi arbeiðstíðum ella inntøkum, kann eitt longri og meira umboðandi tíðarskeið ásetast sum útrokningargrundarlag. Men hóast hesa serregluna í § 8, stk. 3 eru løntakarar, sum kunnu koma illa fyri fíggjarliga í sambandi við sjúku.

Upphæddin, sum verður veitt í sjúkradagpeningi er svarandi til mistu arbeiðsinntøkuna, tó við einum hámarki á 80 prosent av eini arbeiðsmannaløn. Tað merkir, at persónar, ið arbeiða niðursetta tíð, vanliga fáa fult endurgjald fyri mistu arbeiðsinntøkuna, tá tey eru sjúk. Hjá teimum, sum arbeiða fulla tíð ella hava eina hægri løn, kann sjúkradagpeningur í mesta lagi vera 5.196 kr. um vikuna, íroknað frítíðarløn.

Landsstýrismaðurin metir tað ikki vera nøktandi, at tey, sum eru fevnd av sjúkradagpengaskipanini, í mesta lagi kunnu fáa 80 prosent av eini arbeiðsmannaløn, tá tey eru sjúk. Somuleiðis heldur landsstýrismaðurin tað ikki vera nøktandi, at tað skal vera so stórur munur á rættindum í sambandi við sjúku hjá ymsu pørtunum av arbeiðsmarknaðinum.

Soleiðis hevur tað verið síðstu 60-65 árini. Sambært starvsmannalógini frá 1958 er frávera vegna sjúku lógligt forfall, og starvsmaður hevur sostatt rætt til løn undir sjúku. Eisini eru nakrir fakbólkar, ið sambært sáttmála hava rætt til løn undir sjúku. Ein stórur partur av løntakarum á føroyska arbeiðsmarknaðinum hava ikki rætt til løn undir sjúku og eru sostatt fevnd av

sjúkradagpengalógini. Meginreglurnar í galdandi sjúkradagpeningalóg byggja á gomlu donsku sygeforsikringsloven frá 1960, har dagpengahjálp í mesta lagi kundi vera 4/5 av inntøku frammanundan sjúkrafráveru. Í upprunaligu dagpeningalógini frá 1979 var dagpeningaupphæddin 80 prosent av inntøkuni frammanundan – eisini hjá lágløntum. Í núgaldandi løgtingslóg um dagpening vegna sjúku, sum kom í gildi í 2001, verður dagpeningur veittur fyri fullan lønarmiss, tó í mesta lagi 80 prosent av eini arbeiðsmannaløn.

Samfelagið hevur flutt seg og arbeiðsmarknaðurin hevur flutt seg, uttan at lóggávan er ment samsvarandi. Sum spyrjarin ger vart við í viðmerkingunum til spurningin, hevur Løgtingið í fjør samtykt fleiri framtøk í dagpeningalógini, men vit eru ikki komin á mál, og tørvur er á at endurskoða nakrar meginreglur í okkara sjúkradagpeningaskipan. Hetta arbeiðið er ikki farið í gongd enn.

Tórshavn, 29. juni 2023

Sirið Stenberg
landsstýrismaður